**UTTAN ÚR HEIMI**

## USA mist 101 hermenn

Amerikanska verjumálaráðið Pentagon kunngjørdi í gjár, at 101 amerikanskir hermenn eru falnir, síðani amerikanarar og bretar lupu á Irak fyri trimum vikum síðani.

Sambært uppgerðini hjá Pentagon eru 399 hermenn og onnur starvsfólk hjá herdeildunum í Irak særd í krígnum.

Ellivu amerikanskir hermenn eru horvnir, og irakar hava tikið sjey amerikanskar hermenn til fanga, sigur Pentagon.

## USA var ótolið

Fyrrverandi formaðurin hjá ST-vápnaeftirlitsmonnunum í Irak, sviin Hans Blix, sigur, at iraksku myndugleikarnir vóru júst farnir at samstarva við vápnaeftirlitsmenninar, tá USA leyp á landið.

- Amerikanska stjórin gjørdist ótolin, tá irakar veruliga byrjaðu at samstarva, sigur Hans Blix í samrøðu við spanska blaðið El Pais.

Hann sigur, at ta seinastu tíðina undan amerikanska álopinum lótu iraksku myndugleikarnir vápnaeftirlitsmonnunum týðandi upplýsingar. Eitt nú fingu vit nøvnini á serfrøðingunum, sum vóru við til at beina fyri hópoyðingarvápnum í 1991, sigur Blix við blaðið.

## Stríð um skjøl hjá Saddam

Tað var eitt stríð millum amerikanskar og russiskar fregnartænastumyndugleikar um at tryggja sær loynilig iraksk skjøl, sum var orsøkin til, at skotið varð eftir einum bilafylgi við russiskum diplomatum, sum vóru á veg úr Bagdad til Sýrialands.

Tað skrivar eitt russiskt blað. Blaðið vil vera við, at russiska tænastan SVR, sum er ein partur av tí gamla KGB, royndi at taka tey loyniligu skjølini við sær úr Irak, og at amerikanska fregnartænastan CIA royndi at forða tí. Blaðið sigur eisini, at eitt ómannað amerikanskt flogfar eygleiddi russiska bilafylgið allan vegin.

Tilburðurin var seinasta sunnudag, og fimm starvsfólk á russisku sendistovuni í Bagdad vórðu særd, tá skotið varð eftir bilum teirra.

Tað er greitt, at tað vóru amerikanskir hermenn, sum skutu eftir russisku bilunum, og amerikanska stjórnin hevur lovað at kanna málið. Amerikanarar hava fyribils sagt, at ein orsøk kann vera, at russiska bilafylgið valdi eina aðra leið enn hana, sum partarnir høvdu avtalað frammanundan.

## Spælið er liðugt

Irak hevur ongan sendiharra á ST-høvuðsborgini í New York longur. Mohammed Aldouri, sendiharri fór gjáranáttina við flogfari úr New York til París.

- Spælið er liðugt. og nú byrjar arbeiðið fyri friði. Vit vóna, at friðurin fer at sigra, segði Aldouri, sum er tann fyrsti almenni irakski umboðsmaðurin uttanlands, sum hevur ásannað, at stýrið hjá Saddam Hussein ræður ikki fyri borgum í Bagdad longur.

Seinastu dagarnar hava nógv tíðindafólk gingið aftan á Mohammed Aldouri. Fyrrakvøldið eydnaðist nøkrum teirra at fáa orð á hann, og tað var tá, hann ásannaði støðuna. Hann segði eisini, at hann hevði ikki havt samband við stjórnina í Bagdad í fleiri dagar.

Tað er framvegis ikki greitt, hvussu verður við hinum almennu iraksku umboðunum á ST-høvuðsborgini.

# Soleiðis gongst tað einaræðisharrum



*Tann tíggju metrar høga standmyndin av Saddam Hussein fellur*

**-Ein søguligur tilburður, tá tann stóra standmyndin av Saddam Hussein á torginum í Bagdad fall, sigur amerikanska stjórnin, sum samstundis ávarar um, at kríggið er ikki liðugt.**

KRÍGGJ Í IRAK
*Árni Joensen:*

Amerikanski verjumálaráðharrin, Donald Rumsfeld, hevði týðiliga fyrireikað seg væl, tá allur heimurin hevði sæð myndir av amerikanskum hermonnum og irakum fella ta tíggju metrar stóru standmyndina av Saddam Hussein á torginum í miðbýnum í Bagdad.

- Soleiðis gongst tað einaræðisharrum, og við hesum er ein komin afturat liðinum, sum frammanundan taldi menn sum Hitler, Stalin, Lenin og Cheasescu, segði Rumdfeld.

Men hann ávaraði samstundis um, at fallið merkir ikki, at kríggið er liðugt. Tvørturímóti eru harðir bardagar eftir, áðrenn vit kunnu siga, at kríggið er av, segði verjumálaráðharrin.

Fyrradagin ljóðaði, at Saddam Hussein eftir øllum at døma var flýddur úr Bagdad til býin Tikrit, haðani hann er ættaður, men í gjár leitaðu amerikanskir hermenn framvegis eftir honum í Bagdad.

Samstundis gjørdu herdeildir seg til reiðar at fara til Tikrit, sum er einar 160 kilometrar norðan fyri Bagdad. Útlendskir hernaðarserfrøðingar halda, at millum 20.000 og 40.000 hermenn úr teirri serligu Tjóðarhirðini hava støð har. Seinastu dagarnar hava amerikansk bumbuflogfør søkt at málum í og uttan fyri býin, har umleið 250.000 fólk búgva.

# Concorde- fløgførini verða sett

**Bæði British Airways og Air France hava gjørt av at taka Concorde-flogførini úr flúgving.**

FLOGFERÐSLA
*Árni Joensen:*



*Fyri 26 árum síðani vórðu Concorde-flogførini mett sum ein kollvelting innan flogferðslu. Nú verða tey sett*

Eftir at hava flogið tvørtur um Atlantshavið í meiri enn 26 ár verða Concorde-flogførini nú sett. Tað hendir síðst í oktober, tá bæði British Airways og Air France fara at taka flogførini úr rutu. Tey bæði feløgini eru tey einastu, sum hava flogfør av hesum slagnum.

Talskvinnan hjá British Airways, Sara John, sigur, at minkandi eftirspurningur eftir ferðaseðlum við Concorde-flogførunum er orsøkin til avgerðina.

Bæði British Airways og Air France valdu at seta flogførini, eftir at eitt av fløgførunum hjá franska felagnum datt niður uttan fyri París. Í november í 2001 fóru tey aftur á flog, men tá var áhugin fyri at flúgva minkaður nógv orsakað av yvirgangsatsóknunum í USA tveir mánaðir frammanundan.

Tað bøtti ikki um umdømið hjá Concorde-flogførunum, tá eitt av flogførunum hjá Air France noyddist at neyðlenda í Halifax í Nova Scotia fyri tveimum mánaðum síðani, tí ein av motorunum gjørdist í ólagi, meðan flogfarið fleyg tvær ferðir skjótari enn ljóðið.

Men tey, sum hava ringa tíð, fáa kanska ein annan møguleika, tí japanar eru í ferð við at gera eitt flogfar, sum skal flúgva væl skjótari enn onnur flogfør.



# - Vit hava tørv á blóði

**Týsdagin hevði felagið Blóðgevi í Havn ársaðalfund. Tað eru trý blóðgevarafeløg í landinum, eitt til hvørt sjúkrahús. -Tað er tørvur á fleiri blóðgevum, skulu vit røkka aðalmálinum, sum er at verða sjálvbjargin við blóði í Føroyum, sigur Marita Simonsen, formaður í felagnum**

BLÓÐDONORAR
*Rúna Sivertsen*



*Eftir fundin sóu limirnir filmin hjá Flexnes, sum avgjørt ikki fann seg í, at hansara blóð varð givið politikarum. Um Jonhard Larsen, blóðgevi í Klaksvík (myndin) hevur lagt treytir við, hvør kann fáa hansara blóð, sigur søgan einki um*

*Mynd Rúna Sivertsen*

Fyri tveimum árum síðani varð felag fyri blóðgevar sett á stovn í Havn. Felagið varð stovnað 23 mai, sum er altjóða blóðgevaradagur. Hetta varð gjørt fyri at styrkja blóðbankan í Føroyum og fyri at røkka málinum, at vit skulu verða sjálvbjargin við blóði her á landi.

Trý blóðgevarafeløg eru í Føroyum, Klaksvíkar Blóðdonorlið, sum longu varð stovnað í 1957. Triðja felagið er Blóðagevar í Suðuroy, sum varð stovnað 20. februar í fjør.

Blóðbankin hevur tó virkað her heima síðani í 50'unum.

Tilsamans hava feløgini 1600 blóðgevar. Felagið í Havn hevur 1100, tað í Klaksvík 300, og í Suðuroy eru 200 blóðgevar.

- Men hetta er framvegis ikki nóg mikið, skulu vit sleppa undan at fara uttanlands eftir blóði, sigur Marita Simonsen, formaður í felagnum, Blóðgevi.

### Blóðkampanja

Blóðgevarafelagið er farið undir eitt átak fyri at fáa fleiri blóðdonorar. Hetta verður m.a. gjørt við tí pengi, sum nú er møguligur at fáa av játtanunum hjá sjúkrahúsunum.

- Í ár hava vit nýtt pengingin til eina heimasíðu; hon verður væntandi klár tann 25. apríl. Hendan dagin er eisini ætlanin at hava eitt átak á Vaglinum fyri at vísa á, at tørvur er á blóði í Føroyum, sigur Marita.

Tá verður møguligt hjá fólki, at seta blóðgevum spurningar. Børnini fáa ballóni, og tey vaksnu kunnu ogna sær parkeringsskivur, sum vísa til heimasíðuna, www.gevidblod.fo.

- Tað vísir seg uttanlands, at heimasíðurnar gera mun, tá tað ræður um at fáa fólk at tekna seg til blóðgevar. Tað eru serliga tey ungu, ið vitja hesar síður, og tað er júst teimum, vit hava brúk fyri, sigur Marita.

### Álvara og skemt

Eftir ársaðalfundin var drekkamuður at fáa umframt breyð og køkur. Skemtiligi filmurin hjá Flexnes, tá hann læt blóð, varð vístur og fekk sjálvsagt lív í fundarfólkið.

- Dupultkvartettin í Ebenezer sang, so tað var ógvuliga hugnaligt, sigur Marita.

Í nevndini hjá Blóðgeva sita: Marita Simonsen, formaður, Jóhan Hendrik Winther Poulsen, næstformaður, Rúni Sørensen, nývaldur, Randi Herup Jacobsen og Heðin Thomsen.

Blóðgevararnir í Føroyum geva tilsamans 2000 portiónir av blóði um árið.

# Gongutúr eftir Konradsbrekku

**Leygardagin 12. apríl klokkan 15 skipar Felagið Tórshavn fyri spákingartúri**

TÚRUR
*Ingrid Bjarnastein*

Klokkan 15 leygardagin byrjar ein spákingartúrur niðri við Smiðjuna í lítluvík, ella har Konradsbrekka og Bøgøta koma saman. SPákað verður niðan eftir KOnradsbrekku og síðan niðan eftir Dalavegnum niðan til Hyrdan og Brynjer.

Felagið Tórshavn, sum skipar fyri túrinum, roknar við einum hóapi av fólki. Í skrivi siga tey, at ein ótrúligur skari av fólki hava gingið, runnið, súkklað og skreitt í Konradsbrekku ella keypt okkurt í kioskini já Eiler.

– Ikki fá hava hingið í rekkverkinum. Summi skuldu oman í býin ella Vágsbotn, og onnur skuldu oman til Bakaríið hjá Gunnar í Horni. Men tú gekk eisini henda vegin út á Skálatrøð, Skipasmiðjuna, Fabrikkina ella longur út. Ein hópur fór oman og niðan eftir Dalavegnum, og longu áðrenn 1800 fóru líkfylgini niðan eftir Konradsbrekku og Dalavegnum, sigur Felagið Tórshavn í tíðindaskrivi.

Á túrinum fara eldri sum yngri at hittast at minnast bestu løturnar í Konradsbrekku og á Dalavegnum, og roknað verður við, at fleiri foreldur, abbar og ommur fara at siga børnum og barnabørnum frá, hvar tey búðu og spældu.

# Prix-kvøldini halda fram

**Í kvøld, fríggjakvøld, verður aftur eitt Prix kvøld á Platform. Hesaferð verða tað bólkar nir Hatespeech og Flux, sum fara at spæla**

PRIX
*Ingrid Bjarnastein*



*Hatespeech og Flux spæla í Platform fríggjakvøldið*

Fyri nøkrum vikum síðani byrjaði Platform við tiltaki, ið tey kalla fyri Prix kvøld. Fyrsta kvøldið var við Páll Finnur Páll og Déja Vu, og nú er annað Prix kvøldið á skránni.

Nú fáa havnarfólk og tey, ið leita sær í Platform fríggjakvøldið, høvi til at hoyra Hatespeech og Flux.

Byrjað verður klokkan 23 og teir báðir bólkarnir skiftast um at spæla til klokkan 01. Aftaná verður diskotek.

Atgongumerkini eru eisini bíligari áðrenn klokkan 01. Tá kosta tey 50 krónur, men kemur tú aftaná klokkan 01 fer prísurin upp á 80 krónur.